# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*- Amerikanska avgerðin at senda fleiri hermenn til Irak fyrr í ár hevur forðað politiskari semju*

*(Meiningakanning í Irak)*

# Stóð við bryggjuna í Hirtshals

**Júst sum norska ferjan Pride of Telemark kom inn í havnina í Hirtshals, fór streymurin umborð, so ferjan sigldi á ein mola og fekk hol á botnin**

Óhappið hendi um eitttíðina síðstu nátt. Tað eydnaðist at toga ferjuna at bryggju, men skjótt var so nógvur sjógvur í tí, at tað stóð á botni við bryggjuna. Alla nátt og allan dag hava pumpur hjá donsku tilbúgvingini hildið skipinum lens, men myndugleikarnir tordu ikki at senda kavarar niðurundir at vita, hvussu stóran skaða skipið hevur fingið.

150 ferðafólk og manningin, sum telur 64, vóru umborð, tá Pride of Telemark fór á molan, men eingin fekk skaða. Øll fóru av skipinum, tá tað var komið til bryggju, men umleið 55 lastbilar og fleiri persónbilar eru framvegis umborð á ferjuni.



*Pride of Telemark hevði slagsíðu, tá hendan myndin varð tikin fyrrapartin í dag*

Pride of Telemark er bygt í 1983 og hevur siglt fyri norska reiðaríið KystLink síðani 2005. Skipið er 155 metrar langt og tekur 1.500 ferðafólk og 500 bilar.

# Íslendingar vilja upp í ES

**Helmingurin av teimum íslendsku veljarunum vilja hava stjórnina at taka upp samráðingar við ES um limaskap**

Altsamt fleiri íslendingar halda, at landið eigur at fara upp í ES, og sambært einari nýggjari kanning er undirtøkan fyri limaskapi vaksin fimm prosentstig síðani fyrst í hesum árinum.

Kanningin, sum Gallup hevur gjørt fyri íslendska ídnaðarfelagið, vísir, at 60 prosent av veljarunum hjá fýra teimum størstu flokkunum vilja hava stjórnina at senda Bruxelles fyrispurning um samráðingar. Av teimum stóru flokkunum er tað bara Salfylkingin, sum hevur sett í stevnuskránna, at Ísland eigur at søkja um limaskap í ES. Kanningin hjá Gallup vísir, at tað halda 70 prosent av veljarum floksins eisini.

Samanumtikið eru umleið helmingurin av teimum íslendsku veljarunum fyri limaskapi í ES, og tað eru umleið fimm prosentstig meiri enn í februar, skrivar Morgunblaðið. Ein fjórðingur siga nei. 56 prosent halda, at ES-limaskapur hevði givið íslendingum betri umstøður í gerandisdegnum. 25 prosent siga tað øvugta.

# Rendur avstaðaftur

**Fyrrverandi pakistanski forsætisráðharrin Nawar Sharif slapp bara heim at venda**

Eftir at hava verið í útlegd í átta ár, ætlaði Nawar Sharif sær aftur til Pakistan at bjóða Pervez Musharaf, forseta av. Men tað varð av ongum, tí longu í floghavnini fekk hann tvinnar kostir í at velja. Annaðhvørt kundi hann fara av landinum aftur alt fyri eitt, ella fór hann í fongsul. Løtu seinni fór hann aftur á flog.

- Hetta var hansara egna val. Hann hevur lovað at vera í útlegd í tíggju ár. Tað hevur hann avtalað við stjórnina í Saudiarabia, og vit vænta, at hann heldur avtaluna. Hin møguleikin var, at hann fór beinleiðis í fongsul, segði pakistanski kunningarmálaráðharrin, Tariq Azim, við BBC.

Tað var Pervez Musharaf, forseti, sum koyrdi stjórnina hjá Nawar Sharif frá í 1999. Nú ætlaði Sharif sær heimaftur at stilla upp ímóti Musharaf á forsetavalinum næsta ár. Men tað slapp hann ikki.

Fleiri túsund viðhaldsfólk hjá Sharif mótmæltu í gjár viðferðini, sum hann hevði fingið, og í fleiri støðum vóru samanbrestir ímillum viðhaldsfólkini og løgregluna.



*Nawar Sharif*

## STUTT SAGT

### Vorðið sum endurgjald

Hægstirættur í Indonesia hevur gjørt av, at amerikanska tíðarritið Time skal rinda fyrrverandi indonesiska forsetanum Suharto 572 mió. krónur í endurgjaldi, tí tíðarritið prentaði eina ærumeiðandi grein um fyrrverandi forsetan í 1999. Í greinini stóð millum annað, at Suharto-ættin hevði lagt næstan 400 mia. krónur undir seg tey 32 árini, Suharto var forseti. Indonesiska dómsvaldið hevur eisini gjørt av, at Time skal biðja Suharto um umbering, og at umberingin skal prentast í tíðarritinum fleiri ferðir.

### Stórsmuglari tikin

Í Kolombia hevur løgreglan handtikið ein tann best kenda rúsevnasmuglaran í landinum. Sambært almenna útvarpinum varð Diego Leon Montoya Sanchez tikin í fjøllunum í landspartinum Valle del Cauca har suðuri í landinum. Kolombiski innanríkisráðharrin, Carlos Holguin, sigur við útvarpið, at Montoya var leiðari í einum av teimum størstu rúsevnafelagsskapunum, og at bæði kolombiska ákæruvaldið og amerikanska løgmálaráðið vilja hava fatur á honum. Tað er ikki greitt, hvussu Montoya bleiv avdúkaður, men myndugleikarnir høvdu lovað 25 mió. krónur í finningarløn, um onkur vildi avdúka hann.

### Hugdi at ísinum í Grønlandi

Franskiumhvørvismálaráðharrin, Jean-Louis Borloo, var í gjár á stuttari vitjan í Grønlandi, har hann kunnaði seg um avleiðingarnar, sum veðurlagsbroytingarnar hava á ísin. Saman við grønlendska landsstýrismanninum í umhvørvismálum, Arkalo Abelsen, vitjaði hann Ilulissat-fjørðin, og aftaná høvdu teir báðir ein fund um ymisk viðurskifti millum Grønland og ES. Franski ráðharrin fór aftur til Fraklands longu í gjárkvøldið.